## Tjóðargáva rotnar burtur

Tá íslendingar í 1974 hátíðarhildu, at 1100 ár vóru liðin síðani landnámið, fekk Ísland tveir bátar úr Noregi sum gávu. Annar, sum æt Ørnin, varð latin Reykjavíkar býi, og hin fór til Húsavíkar. Fyri tveimum árum síðani fekk eitt savn í Reykjavík tann fyrra bátin í varðveiðslu, og nú skriva íslendsk bløð, at báturin er um at rotna burtur. Vísir skrivar, at savnið, sum hevur bátin, bant seg til at umvæla hann, men at einki er gjørt við hann.



*Norska tjóðargávan stendur og rotnar í Njarðvík (Mynd: Vísir)*

## Grøn stóra framgongd

Íslendska stjórnin hevði ikki komið í vanda, um altingsval hevði verið nú, tí sambært einari kanning høvdu teir báðir stjórnarflokkarnir fingið 60,2 prosent av atkvøðunum. Sjálfstæðisflokkurin hevði fingið 38,6 prosent og 25 tingmenn, ið er tað sama sum nú. Samfylkingin hevði hinvegis mist ein tingmann. Andstøðumegin høvdu tey í Vinstra grønu fingið stóra framgond - úr 14,3 í 20,9 prosent og 14 tingmenn ímóti 9, sum flokkurin hevur nú.

# Noyðist at rinda fyri ovurveiði

**Fiskimálaráðharrarnir í ES samdust herfyri um, at Pólland skal rinda við skerjing í kvotum tey næstu árini fyri ovurveiði av toskakvotuni í Eystursjónum fyri 2007**

**PÓLLAND**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Eva Kjer Hansen er danskur fiskimálaráðharri*

Á fundi í Luxemburg herfyri samdust fiskimálaráðharrarnir í ES um, at pólska ovurveiðan upp á 8.000 tons av toski í 2007 skal mótroknast pólsku toskakvotunum í Eystursjónum tey næstu fýra árini.

Í ár verður kvotan skerd við 8.000 tonsum, og í 2009, 2010 og 2011 skulu póllendingar av við tað, sum svarar til 30% av ovurveiðini.

Danski fiskimálaráðharrin, Eva Kjer Hansen, legði á ráðsfundinum í ES dent á, at ES-nevndin fer at fylgja væl við pólsku veiðini tey næstu árini.

ES-kommiserurin, Joe Borg og pólski fiskimálaráðharrin, søgdu báðir, at teir fara at taka málið upp beinanvegin, um tað skuldi hent, at pólsku fiskiførini fiska meira enn loyvdu - og skerdu - veiðina í 2008.

- Tað er ógvuliga avgerandi, at hetta ikki endurtekur seg, sigur danski fiskimálaráðharrin, Eva Kjer Hansen.

Hon er annars sera fegin um, at Pólland á ráðsfundinum segði, at eingin toskaveiða verður í Eystursjónum í nakrar mánaðir í summarhálvuni.

- Líkt er til, at pólsku myndugleikarnir vilja fremja burðardygga veiði í Eystursjónum, og tað fegnast vit um, segði hon.

# Granskarar í veiðitøkni á ráðstevnu í Føroyum

**- Arbeitt verður alla tíðina við nýggjari tøkni, bæði í reiðskapi og veiðiførum, og í FTFB verður dentur lagdur á, at veiðan fer væl við umhvørvinum, sigur Bjarti Thomsen**

**RÁÐSTEVNA**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Bjarti Thomsen (FTFB-umboð) og Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Út við 70 fiskivinnugranskarar úr øllum heiminum halda hesa vikuna ráðstevnu í Føroyum. Stevnan, sum er á Vinnuháskúlanum, varð sett klokkan 9 í morgun av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Tórbjørn Jacobsen.

Talan er um arbeiðsbólkin FTFB, sum stendur fyri Fishing Technology and Fish Behaviour. Bólkurin arbeiðir fyri havgranskingarstovnin ICES og FAO, sum er matvørufelagsskapurin hjá ST.

FTFB kemur saman eina ferð um árið at viðgera tekniskar fyrispurningar viðvíkjandi veiðitøkni frá FAO og ICES og limalondunum.

Nú FTFB-fundurin er í Føroyum, hevur FAO gjørt av at leggja ein av teirra fundum her, og tí fara eisini eini 15 fólk úr tropiskum londum at hava serligan fund um tropiska rækjuveiðu.

Tað eru Bjarti Thomsen og Kristian Zachariassen, ið báðir hava arbeitt við veiðitøkni, sum fyri Fiskirannsóknarstovuna hava luttikið í Fishing Technology and Fish Behaviour (FTFB) seinastu árini.

### Reiðskapur

Bjarti Thomsen sigur, at fleiri av luttakarunum á ráðstevnuni eru tað, sum rópt verður reiðskapsfrøðingar, men fleiri havlívfrøðingar eru eisini við.

- Hetta eru fólk víða um úr heiminum, sum eitt nú arbeiða við ymiskari veiðitøkni, men við eru eisini fiskifrøðingar, sum arbeiða við hesum.

Hann sigur, at fólk eru eisini við á ráðstevnuni, sum vita ein hóp um, hvussu ymiskur fiskur ber seg at.

- Við á ráðstevnuni eru fólk heilt úr Indonesiu og Filipinunum, og ætlandi skuldu eisini fólk verða við av Kuba, men eg haldi ikki, at hesi eru komin, tí trupulleikar vóru við visa, sigur Bjarti Thomsen.

Hann vísir á, at talan er ikki um reiðskapsfrøðingar og fiskifrøðingar, sum fáast við stovnsmetingar, men meira um, hvussu veiðast kann við reiðskapi og skipum, sum eru burðardygg, samstundis sum hesi fara væl um fiskastovnarnar.

- Arbeitt verður alla tíðina við nýggjari tøkni, bæði í reiðskapi og veiðiførum, og í FTFB verður dentur lagdur á, at veiðan fer væl við umhvørvinum, sigur Bjarti Thomsen.

# Svangligt hjá Hermanni og Sigurdi



*Svangligt verður, tá ið eingin veiða og framleiðsla verður í fiskivinnuni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Tað er heilt óskiljandi, at menn í álvara kunnu siga, at fiskivinnuni ikki vantar fólk, heldur Óli Lassen, reiðari í Klaksvík**

**FISKIVINNA**

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í grein á heimasíðuni hjá Føroya Reiðarafelag vísir Óli Lassen, reiðari á, at fiskivinnuni vantar nógv fólk, bæði til skipini og virkini.

- Flakavinnuni á landi vantar fólk, og stjórarnir á Kósini og Faroe Seafood eftirlýsa báðir fólki. Eisini liggja fleiri skip orsaka av manningartroti.

Reiðarin vísir á, at tað eru fleiri enn 10 útróðrarbátar, ið liggja, tí manning er ikki til bátarnar, sjálvt um úrtøkan hjá útróðrarmonnum er góð.

Hann sigur, at fiskivinnan stendur fyri meiri enn 95% av okkara vøruútflutningi, og tí er tað óskiljandi, at henda vinna skal niðurgerast, og at menn ynskja, at fólk skulu fara úr fiskivinnuni.

- Skulu øll arbeiða í Havn og kopiera, kontrolera og kommunikera hvør við annan? spyr Óli Lassen.

Hann heldur, at um so verður, kunnu vit sanniliga vænta, at sveiggj verða í føroyska búskapinum.

- Tað verður svangligt hjá Hermanni Oskarssyni, stjóra á Hagstovu Føroya og Sigurdi Poulsen, landsbankastjóra, um øll skulu liva í tænastuvinnuni - byggja hús fyri hvønn annan og klippa hvør øðrum, heldur Óli Lassen.

Reiðarin vísir eisini á, at nógvar hendur vanta í føroysku línuskipavinnuni.

- Vit vilja tí heita á myndugleikar og almennar stovnar um heldur at verða viðspælarar – enn mótspælarar, sigur Óli Lassen, reiðari.

12 prosent av føroysku løntakarunum arbeiða í fiski- og alivinnuni, og Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, segði herfyri, at hetta tal eigur at koma niður á 7%.

- Tá fáa vit færri sveiggj í føroyska búskapinum, helt hann fyri.